## Gult kort gevur útvísing

Nú er nýggja reglan fyri gul kort í unglingadeildini komin í gildi. Reglan er, at tá leikari fær víst gult kort, skal hesin út á bonkin at sita í 10 min. Lið hansara hevur ikki loyvi at seta annan leikara inn ístaðin, og harvið leikar liðið við 10 leikarum í 10 minuttir. Tá 10 minuttir eru farnir kann leikar koma inn aftur, so skjótt sum steðgur er í spælinum og dómarin gevur tekin um hetta. Í fyrstu syftu verður reglan bert galdandi fyri unglingadeildina, og sambært FSF er endamálið, at leikarar fáa størri virðing fyri gulu kortunum, so at hesir verða betri skúlaðir og klárir til avbjóðingina, tá teir koma til vaksnamannadeildirnar.



## Meira bonus til Toda

Leiðslan í Start vil løna spælarunum, um teir halda fram við góðu gongdini í steypakappingini. Todi Jónsson og liðfelagararnir eru komnir í hálvfinaluna í steypakappingini, og um teir vinna kappingina, skulu teir hava bonus frá felagnum. Higartil hava ongar fastar bonusavtalur verið millum felag og spælarar, men tað skal nú broytast.

- Tað verður eingin risaupphædd, men vit skulu løna spælarunum, um teir vinna steypakappingina, sigur Trond Are Gjone, ítróttarstjóri í Start.

# Tað spøkir á Mølini

**Fyri fyrstu ferð í ár hevur EB/Streymur tilsaman bara fingið eitt stig burtur úr tveimum landskappingardystum á rað**

FORMULADEILDIN 20. UMFAR
*Jákup Mørk*

Endaspurturin í hesum kappingarárinum nærkast. Enn er tað ikki soleiðis, at tað ikki ber til at vinna tað aftur, sum verður mist í einum dysti. Men tað gongur tann vegin.

EB/Streymur tapti í Gundadali móti B36. Tað bar við sær, at tey næstu høvdu ein møguleika at nærkast toppinum. Havnarfeløgini tóku av hesum tilboðnum. B36 setti EB/Streym upp á pláss, og HB vann í Runavík.

KÍ klossaði í tí á heimavølli móti botnliðnum VB/Sumba, og GÍ misti tvey stig á heimavølli móti B68 í gjárkvøldið. Sovorðin úrslit svíða í kapping, har nógvir dystir millum toppliðini hava verið sera tættir, og nógvir eru endaðir við javnleiki. Í Klaksvík kunnu teir við eitt sindur av høvuðrokning staðfesta, at um teir høvdu havt fingið seks stig burturúr heimadystunum móti B68 og VB/Sumba í staðin fyri einki stig at hava fingið, so høvdu teir verið javnir við EB/Streym í stigum, áðrenn samansetta liðið í annaðkvøld fer at spæla útsetta heimadystin móti ÍF.

### Gummibeinini

Spurningurin er nú, hvussu tað fer at hilnast hjá EB/Streymi, sum hevur verið oddalið alla kappingina. Teir eru oddalið og tvey stig frammanfyri HB, og um teir vinna í annaðkvøld, so verða teir undan 21. umfarinum fimm stig frammanfyri HB. Um munurin verður so stórur til næstfremsta liðið valdast um, hvussu tað fer at ganga millum B36 og NSÍ í annaðkvøld.

Tá ið kappingin er so mikið gomul, sum hon nú er tað, so verður ofta hugt eftir, hvørji mótstøðuliðini eru í restini av kappingini. EB/Streymur skal ikk spæla aftur móti HB og B36, og EB/Streymur skal spæla móti øllum teimum trimum niðastu á talvuni.

Nú sunnudagin skal EB/Streymur spæla á heimavølli móti NSÍ. Fyrr í ár hevur NSÍ tvær ferðir vunnið móti EB/Streymi. Báðu ferðirnar hevur tað verið á heimavølli. Tí verður talan um rættuliga roynd hjá oddaliðnum.

Eftir tapið í Gundadali móti B36 er skjótt at staðfesta, at hetta var fyrsta ferðin í ár, at EB/Streymur bara hevur fingið eitt stig burturúr tveimum dystum á rað. Fyrst spældu teir 1-1 á heimavølli móti HB, og so taptu teir móti B36. Tí er tað eitt must hjá EB/Streymi at vinna øll stigini móti ÍF.

Í sovornum førum er skjótt at spyrja, um tað nú eru tey berømtu gummibeinini, sum spøkja á Mølini. Ofta vísir tað seg, at tey, sum ikki eru so roynd í avgerandi støðum, fara at skinkla ella fáa gummibein, tá ið tey veruliga skulu standa sína roynd. Avrikini og úrslitini móti havnarfeløgunum kundu bent á, at hetta er við at gerast støðan á Eiði.

Men sunnudagin fær EB/Streymur besta møguleikan, sum teir kunnu fáa at prógva, at tosið um gummibein einki hevur uppá seg. Um teir tapa móti NSÍ, so verður tað soleiðis, sum tað plagar at vera, og so fer av álvara at verða tosað um gummibein. Um teir vinna, so verður tað staðfesting av, at tað er tað formatið yvir oddaliðnum, sum plaseringin á stigatalvuni ber boð um.

### Tey næstu

Spurningurin er so, hvørji tey eru, sum kanska kunnu bjóða EB/Streymi av í toppstríðnum. GÍ og KÍ tykjast rættuliga óstøðug. NSÍ hevur verið væl við, men sum so mangan áður, so snávaðu teir gulu, tá ið teir sunnudagin rættuliga skuldu vísa, at teir eru gott boð upp á FM heitið, sum teir ongantíð áður hava vunnið.

B36 hevur verið óstøðugt, men móti EB/Streymi vóru teir manningarliga betri fyri, enn teir leingi hava verið tað, og tað kann gott vera, at meistararnir fara at fáa størri úrtøku næstu vikurnar, enn teir hava fingið síðani summarsteðgin.

Tað liðið, sum í løtuni tykist vera best fyri at bjóða oddaliðnum av, er HB. Tað hevur ofta verið tikið til, og tølini staðfesta, at unga HB liðið hevur havt tað trupult á útivølli. Í tveimum teimum seinastu umførunum hava teir fingið eitt stig á Eiði og trý stig í Runavík. Tað kundi boða frá, at HB hevur vunnið á útivallar kompleksinum. Í fimm av teimum seinastu sjey umførunum skal HB spæla í Gundadali.

### Sær svart út

Hesa ferð var tað felags fyri tey trý aftastu, at tey fingu úrtøku á útivølli. Tað vil siga, at ÍF, B68 og VB/Sumba hava ikki givið skarvin yvir. Í VB/Sumba hava teir uppnátt venjaraeffektina, sum tað ofta verður tosað um, tá ið gamli venjarin verður uppsagur og nýggjur tekur við. Hesa ávirkanina eydnaðist tað í fyrsta umfari ikki at vinna í Fuglafirði og á Toftum.

VB/Sumba lætti sær orduliga úr botninum við skipaðum avriki og teprum sigri í Klaksvík. Bæði B68 og ÍF vóru á odda, og í báðum førum javnaði heimaliðið stutt undan leikloki.

Nýggju ásetingarnar siga, at tvey feløg skulu flyta beinleiðis niður. Í løtuni bendir ógvuliga nógv á, at tað verða B68 og ÍF, sum fara at eiga tey bæði aftastu plássini. Gamaní fingu bæði liðini stig á útivølli í hesum umfarinum. Men tað kundi eisini bent á, at Skála ikki er so væl fyri, sum tað síðani summarsteðgin hava verið ábendingar um.

Úrslitini hava leingi boðað frá, at GÍ eftir summarsteðgin er ikki tað sama, sum GÍ var undan summarsteðginum. Sjey tær seinastu ferðirnar hevur GÍ ikki vunnið. Fimm ferðir hevur tað verið javnt, og tvær ferðir hevur GÍ tapt – á heimavølli móti EB/Streymi og KÍ.



*Tað liðið, sum í løtuni tykist vera best fyri at bjóða oddaliðnum av, er HB. Í fimm av teimum seinastu sjey umførunum skal HB spæla í Gundadali*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mikukvøldið kemur kappingin upp á pláss aftur, tá ið útsettu dystirnir B36-NSÍ og EB/Streymur-ÍF eru spældir. Sunnudagin verða allir fimm dystirnir í 21. umfari á skránni, sum sær soleiðis út: HB-Skála, EB/Streymur-NSÍ, VB/Sumba-B36, B68-KÍ og ÍF-GÍ.

## Vikuliðið

Sosialurin mannar vikuliðið við leikarum, ið hava staðið seg væl í 20. leikumfari í Formuladeildini




## Sama landslið ímóti Skotlandi

**Allir spælararnir, sum vóru við í stórtapinum hjá Føroyum ímóti Georgia, eru tiknir út til dystin ímóti Skotlandi næsta leygardag**

LANDSLIÐIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur nú sent boð eftir spælarnum, sum hann vil hava við til EM-dystin ímóti Skotlandi í Glasgow 2. september.

Allir spælararnir, sum vóru við í hópinum til dystin ímóti Georgia í síðstu viku, eru tiknir út aftur til dystin hesaferð, og harvið staðfestir landsliðsvenjarin, at hann hevur álit á sínum monnum, hóast stóra tapið seinast.

Eisini Bárður Olsen og Jónhard Fredriksberg, sum komu við upp á avboð, eru tiknir út aftur, tí hvørki Bergur Midjord ella Andrew av Fløtum eru komnir heilt fyri seg eftir skaðar. Bert tveir útisetar eru við í hópinum.

Landsliðið til dystin ímóti Skotlandi sær soleiðis út: Jákup Mikkelsen B36, Meinhardt Joensen KÍ, Óli Johannesen TB, Atli Danielsen KÍ, Janus Joensen HB, Jákup á Borg HB, Vagnur Mortensen HB, Fróði Benjaminsen B36, Kári Nielsen HB, Pauli G. Hansen Skála, Claus Bech Jørgensen Coventry, Bárður Olsen EB/Streymur, Hanus Thorleifsson B36, Hans Pauli Samuelsen EB/Streymur, Símun Samuelsen Keflavík, Christian Høgni Jacobsen NSÍ, Rógvi Jacobsen HB og Jónhard Frederiksberg Skála.